# Eitt tilboð til tey orðblindu

**VESTMANNA** Í Føroyum finnast tey ið kunnu kalla seg orðblind. Hesi hava sínar trupulleikar, men nú fáa tey eina hjálpandi hond

Kvøldskúlin í Vestmanna hevur sett sær fyri at gera nakað munagott fyri at lætta um hjá hesum bólkinum av borgarum okkara.

Talið av teimum orðblindu er ikki so lítið, tí mett verður at fimti hvør vaksin føroyingur hevur brúk fyri at menna sínar skrivi- og lesiførleikar.

Hesin bólkurin hevur ikki havt tað stóra tilboðið frá tí almenna, og tí hava fleiri snøgt sagt valt at flyta til Danmarkar, har størri hjálp er at fáa á miðstøðum fyri henda hart rakta bólkin.

Men nú ætla tey í Vestmanna sær at gera nakað fyri fólk við orðblindni. Ætlanin er nú at bjóða undirvísing, sum fer at tey betur før fyri at lesa og skriva.

Júst hetta er trupulleikin, tí tey hava ilt við at lesa bókstavir og tøl, fáa ikki skriva øll orðini og býta bókstavir um – eins og gjørt er í yvirskriftini til hesa greinina. Tey hava eisini trupulleikar at skriva ein samanhangandi tekst.

Tey ið hava hug fyri hesi hjálpandi hondini kunnu venda sær til Saritu Eriksen, leiðara á kvøldskúlanum í Vestmanna.

snorri@sosialurin.fo




*Tilboðið til tey orðblindu kundi verið nógv betri í Føroyum. Í Danmark verða tey loftað munandi fyrri. Nú verður gjørt nakað fyri tey orðblindu í kvøldskúlanum í Vestmanna (tilvildarlig mynd)*

# Gjalda meiri í skatti



**SØRVÁG:** 1. ársfjórðing í ár hevur Sørvágs kommuna fingið 7,6 mió krónur inn í skatti.

Sama tíðarskeið í fjør var upphæddin 7,3 mió.

- Hetta er ein øking uppá slakar 283.000 krónur, ella ein øking uppá 3,83%, verður sagt úr Sørvágs kommunu.

Meginparturin av økingini higartil í ár stavar frá vøkstrinum í mars mánaði í ár, sum var 254.216 krónur.

Kommunan hevur bara í mars í ár fingið 2,9 mió krónur, ímóti 2,6 mió í mars mánaði í fjør.

snorri@sosialurin.fo

# 90 sangar til Ísraels

**EBENEZER:** Seinni í vikuni leggja 90 spentir sangarar úr kórinum í Ebenezer í Havn ta longu leiðina til Ísraels.

Her er ætlanin at tey skulu vitja um páskirnar í ár.

Men tey gera tó ein avstikkara á vegnum til Ísraels, og bjóða tí til konsert í Norðuratlantsbryggjuni í Keypmannahavn fríggjakvøldið.

Tað forvitnisliga við hesi framførsluni er, at Ebenezerkórið fer at syngja sangir á ikki færri enn trimum málum – føroyskum, enskum og hebraiskum.

Konsertin fríggjakvøldið kl. 20 er ókeypis. Lagt verður tó aftrat, at tað er avmarkað við plássi á staðnum, og tí verður heitt á fólk um at møta í góðari tíð.

snorri@sosialurin.fo

# Fiskivinna í fokus

**Í komandi Oyggjablaði seta vit fokus á fiskivinnu á landi og sjógvi. Lesið í blaðnum mikudagin:**



Jan kennir trukkin út og inn



Johann ger skipan til oljureinsing



Hjalti: Baader heldur og heldur



Báturin skal hella 41 stig



Arnfinnur heldur maskinuni gangandi